## VIÐMERKINGAR

# Skálafjarðartunnilin

Asbjørn Mikkelsen og Kára Johannesen

**Innleiðing**
18 februar 2003 vóru vit á fundi á Svangaskarði, har stigtakarabólkurin til Skálafjarðartunnil kunnaði um arbeiði teirra. Ætlanin fekk stóra undirtøku - og eftir tann fundin hevur verið arbeitt víðari við verkætlanini við stuðli frá kommununum kring Skálafjørðin.

Nú varð so almennur fundur 14.november 2005 um hesa tunnilsgerð, og vit hava sæð ymsar greinar í bløðunum síðani.

M.a. frá Kára Sverrison, sum viðger tunlarnar út frá einum umhvørvisligum sjónarmiði, Rúnu Sivertsen, sum ger ferðslutrygdarligar viðmerkingar, Torbjørn Jacobsen, sum viðger málið rættiliga neutralt, og so góði starvsfelagi okkara í Runavíkar Býráði, Regin Jacobsen, sum vísir á, at linjuføringin eigur at eita Runavík-Tórshavn.

**Linjuføringin**
Hava hug til at nerta eitt sindur við hesa linjuføringina og tey tilmælir, ið vit eru vitandi um - fyriliggja.

Fyrst skulu vit siga, at vit taka fult undir við ætlaðu verkætlanini, sum vit meta kann verða til stórt búskaparligt gagn fyri land og fólk.

Tað verður sagt, at longra beinleiðis linjuføringin millum Runavík-Tórshavn skal vera handilsliga meira áhugaverd. Skilja ikki hetta rættiliga, at farleiðin Runavík-Strendur-Tórshavn skal verða minni áhugaverd, fyri tað, um bilarnir koma upp at 'anda' á Strondum, áðrenn teir fara víðari í næsta tunnil.

Givnu grundgevingarnar eru eftir okkara tykki ov grunnar og smakka heldur av einum ótta fyri, at tey norður-/suðurferðandi (Klaksvík, og aðrar staðir) skulu velja at leggja leiðina gjøgnum tunnilin umvegis vestaru síðu av fjørðinum.

Vit halda nevniliga, at ein slík linjuføring sum henda seinna ljóðar rættiliga viðkomandi og sjálvsøgd. Hon hevði nevniliga avlastað veganetið, tí at ferðslan hevði skipað seg náttúrliga bæði eftir vestur- og eystursíðuni av fjørðinum.

**Kostnaðurin**
Annars dámar okkum væl tankan, at tað skal vera sami kostnaður fyri ein bil at koma av Strondum til Havnar, sum úr Runavík til Havnar, líkamikið hvussu linjuføringin verður.

Hetta skal skiljast soleiðis, at tað t.d. kostar 40 kr at koyra til Havnar, líkamikið hvørju megin fjørðin tú byrjar túrin. Men koyrir tú bert um fjørðin og ikki víðari til Havnar, so er kostnaðurin t.d. 10 kr.

Týdningarmikið er at halda prísinum á einum slíkum støði, at tað er bíligari at taka tunnilin til og úr Havnini heldur enn at koyra langa teinin gjøgnum Sundalagið.

**Tunnilin tvørtur um fjørðin**
Vit eru fyri tunli tvørtur um fjørðin heldur enn brúgv, og okkum hóvar væl, at hesin ætlast at verða tann fyrr lidni av báðum tunlunum.

**Vegakervið - og neyðug átøk**
Viðvíkjandi vegakervinum til og frá tunlunum Eysturoyarmegin er at siga, at eitt fult útbygt vegakervi á vestaru síðu á fjørðinum krevur eina væl minni íløgu til liðugtgerð enn eitt fult útbygt vegakervi á eystaru síðu á fjørðinum.

Hesar neyðugu íløgur í almenna veganetið eru eftir okkara tykki ikki komnar nóg væl við í cost/benefit metingarnar í samband við tunnils-verkætlanina.

Gott nokk eru hesar nevndu íløgur ikki partar av ætlaðu privatfíggjaðu tunnilsverkætlanini, men talan er um neyðugar kommunalar (fjøruvegurin í Runavík) og av landinum fíggjaðar verkætlanir (ætlaði hagavegurin frá Lambareiði og út eftir omanfyri Runavíkina).

**Onnur atlit - jarðfrøðislig, umhvørvislig, trygdar**
Øll atlit skulu sjálvandi koma til viðgerðar, eins og neyðug atlit skulu takast.

Tað verða so teir loyvisgevandi myndugleikarnir, sum í síðsta enda koma at avgera, hvussu linjuføringin skal verða.

**Endi**
Fyri okkara part kunnu vit siga, at vit í økinum eiga at kunna liva við aðrari av nevndu linjuføringum millum Eysturoynna og Streymoynna, men at siga, at tann eina er so innlýsandi røtt fram um hina, tað halda vit er skeivt.

# Rættleiðing til Høgna Hoydal

**Útlendingamálið var ein hurluvasi, tá eg kom í landsstýrið, tí var neyðugt at taka tað upp frá grundini, tað veit eingin betur enn Høgni Hoydal, sum ikki kann renna undan hesum**

Jógvan við Keldu
*løgtingsmaður*



Høgni Hoydal er altíð áhugaverdur at lesa. Hann veit, hvat kann gleða fólk, men gløggur sum hann er, skal ein altíð rokna við einum hálvfjaldum undirstreymi. Seinasta dømið er í Sosialinum nú um dagarnar.

Tá hann sigur, at »útlendingamálið var púra greitt, tá henda samgongan tók við«, veit hann sjálvur, at hetta ikki er rætt. Hinvegin kom undan kavi, hvussu ógreitt útlendingamálið í veruleikum var og hevði verið, tí var neyðugt at gera nakað álvarsligt.

**Fútin rópti varskó**
Fyrstu dagarnar av mínum landsstýrisarbeiði kom undan kavi, at fútin hevði gjørt greitt, at um vit ikki tóku »annað skinn um bak«, tók hann seg burtur úr arbeiðinum.

Sum dømi kunnu nevnast teir seytjan teilendingarnir, sum dagliga vóru í fjølmiðlunum orsakað av, at alt bara hevði staðið til. Hetta var bert fyrsta álvarsmálið, eg rendi meg í.

**Ítróttaravtalan við ongum innihaldi**
Eisini fari eg í hesum umfari at nevna víðagitnu ítróttaavtaluna, sum Høgni Hoydal hevði gjørt við ráðharran í innflytaramálum, sum var gjørd, so hann kundi leypa um, har garðurin var lægstur.

Vit vita, at Høgni er habilur ítróttarmaður. Alt gott um tað. Møguliga lá tað honum nær, og tí hevði hann gjørt eina avtalu um, at hevði tú hondbólts-, flog- ella fótbóltshegni, kundi tú bara við eini undirskrivt sleppa inn at arbeiða, meðan ikki var pláss fyri øðrum útlendingum, sum høvdu hegni til annað ófaklært virksemi.

Útlendsk ítróttarfólk høvdu soleiðis tikið arbeiði frá føroyskum ófaklærdum arbeiðsfólki, serliga nú arbeiðsloysið hevði hug at vaksa.

Tí skrivaði eg ikki undir hesa avtalu, sum fyri okkara umsiting hevði verið vónleys at umsitið. Ein avtala við ongum innihaldi.

**Ivasom rættartrygd**
Nú eri eg ikki løgfrøðingur, men eg kundi hugsað mær, at henda avtala var á markinum til brot á rættartrygdina, tí vit skulu minnast til, at hesi ítróttarfólk vóru ikki profesionel, men skuldu bert fyri ein lítlan part ella í ringasta føri einki verða lønt av ítróttini, men hinvegin skuldu verða lønt sum ófaklærd. Hetta lat seg heilt einfalt ikki gera.

Tað er altíð lættari at leypa um har garðurin er lægstur og ikki taka málið upp í tí veruleika, tað er.

**Smidligari gongd**
Eg harmist sjálvandi um, eftir positiva fundin við Rikke Hvilshøj, ráðharra í innflytaramálum, fyri at fáa smidligari málsgongdir, har ein samstarvsbólkur longu er settur millum Integrationsmálaráðið, Fútan, Innlendismálaráðið og Útlendingstýrið, samstundis sum vit kundu fáa møguleikan fyri at fáa fólk í Útlendingastýrið soleiðis, at hesi kundu avgreiða føroysku málini, at eg ikki slapp at halda fram við hesum, nú tað er sett á skinnarar.

Høgni Hoydal veit, hóast vit báðir eru samdir, at ikki er meiriluti fyri at yvirtaka málið, men tað leggur hann einki í, hann arbeiðir altíð, sum um øll eru samd við hann, tí er so stutt komið á leið hjá honum.

Nei, útlendingamálið var ein stórur hurluvasi, tá eg kom í landsstýrið, tí var neyðugt at taka málið upp frá grundini, tað veit eingin betur enn Høgni Hoydal, sum ikki kann renna undan hesum.

# Privatkapitalistiska høgrarákið



*Sólmundur Joensen*

Menniskja vorðin ein lutur
amboð
ein leirklumpur í hondunum á
valdsharrum, spekulantum

tilevna hesar lutir
til júst tað
hesir hava tørv á

menniskju verða givin
eginleikar
sum deyðir lutir
lutir verða givnir
eginleikar
sum menniskju

kunnu lutirnir ikki brúkast
ónýtuligir

verða tveittir á ruskdungan
tirvdir og gloymdir

samvitskan rekur fyri vág og vind
finnur ongan bústað
í valdsharra- og spekulantahjørtum

spekulantar tilevna leirklumpar
til kør og kerald
fylla tey á tremur
síðan tey tøma og knúsa

verða aftur tilevnað
kapitalismunnar ónda ringrás

fjøldin svevur
og letur seg tøla
av høgrarákinum
kapitalistisku snillingunum

Men nú er stundin komin til handa
aftur verða
eitt virki sjálvstøðugt hugsandi menniskja

niðurberja trælahandilin, trælalívið
pamparaveldið og tess leigusveinar
høgrarákið leggur ein myrkan deyðsskugga
niður yvir samhaldsføstu sosialismuna

socialismunnar aðalhyrnissteinur krevur
at øll menniskju verða
fræls og sjálvstøðug
ikki eitt ílat ella amboð
í hondunum á valdsharrum og
spekulantum

høgrarákið, privatkapitalisman
drepur, oyðir og eitrar
alla mannaættina

fær tørvhungurin at vaksa
gerst størri og størri

marglætishjartan stendur at bresta

aftur hetta árið
vann privatkapitalisman
eitrandi høgrarákið stórsigur

arbeiðarafjøldin, proletararnir
svølta
bløða út

spekulantar við øllum snildum
tøma trogið

privatiseringsgudar í hvørjum skýmaskoti
hava góðar dagar
úr tonnum spekulanta-ríkmanna-
kraddaraevjan rennur
ránsveiðusnillingarnir flenna

arbeiðarastættin stendur
nektaður eftir

men nú er ovboðið
stráðshuga til verka fara
og niðurberja órættvísi!

Trælatíðin er liðug ella?